## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 11*

**RAKSTRARÚTREIÐSLUR**

| | 1999 | 2003 | Hæk./Læk. |
|---|---|---|---|
| §1 Løgtingið | 25.7 mió. | 33.4 mió. | + 20 % |
| §2 Løgmansfyrisiting | 51.2 ” | 30.5 ” | - 25 % |
| §3 Fíggjarmál | 187.0 ” | 216.0 ” | + 15 % |
| §5 Fiskivinna | 211.5 ” | 174.4 ” | - 17_% |
| §6 Vinnumál | 216.4 ” | 333.1 ” | + 54 % |
| §7 Útbúgving og gransking | 514.5 ” | 678.4 ” | - 32 % |
| §8 Almanna- og heilsumál | 1.332.0 mia. | 0 | |
| §9 Oljumál | 16.6 mió. | 29.7 ” | + 75 % |
| §10 Sjálvstýrismál | 12.3 ” | 0 | - 100 % |
| (Játtað 49 mió. 1999-2002) | | | |
| §11 Familju- og heilsumál | 0 | 496.9 ” | §§ 11 og 12 |
| §12 Almannamál | 0 | 1.228.8 ” | §8 |
| §14 Løgmál | 0 | 16.9 ” | + 100 % |
| §20 Rentur | 172.2 ” | 69.9 ” | - 60 % |
| Skattir og avgjøld | 2.093.1 mia. | 3.088.o mia. | +48% |
| Ríkisstuðul | 944.3 mió. | 629.7 mió. | -33% |
| §25 Broyting í virði og skuld | -176.5 ” | 1.8 ” | +100% |
| Afturgjalding av skuld | 691.7 ” | 447.9 ” | - 35% |
| Útvegan av gjaldføri | 379.6 ” | 300.0 ” | |
| Løgujáttan jbr. yvirlit | 162.4 ” | 260.0 ” | |
| Tilsamans | 3.4l7.0 mia. 3.4l7.0 mia. | 4.017.7 ” 4.017.7 ” | |

| | 1999 | 2003 | Hæk./Læk. |
|---|---|---|---|
| §1 Løgtingið | 1.5 mió. | 5.0 mió. | + 333% |
| §2 Løgmansfyrisiting | 2.0 ” | 1.5 ” | - 25% |
| §3 Fíggjarmál | 0 | 2.3 ” | + 100% |
| §5 Fiskivinna | 41.1 ” | 2.0 ” | - 95% |
| §6 Vinnumál | 67.15 ” | 152.0 ” | + 126% |
| §7 Útbúgving og gransking | 18.0 ” | 29.2 ” | + 60% |
| §8 Almanna-og heilsumál | 32.71 ” | 68.0 ” | + 102% |
| §9 Oljumál | 0 | 0 | |
| §11 Familju- og heilsmál sjá §8 | | | |
| Tilsaman | 162.465 mió. | 260.0 mió. | + 60% |

**Samandráttur av fíggjarlógini**

**2002**

| | | |
|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur, netto** | 3.055.771 mia. | |
| **Løguútreiðslur** | 249.850 mió. | |
| **Rentuútreiðslur, netto** | 88.772 ” | |
| **Afturgjald av skuld** | 140.863 ” | |
| **Skattur og avgjøld** | | 3.031.580 mia. |
| **Ríkisstuðul** | | 629.039 mió. |
| **Gjaldførisavlop** | 125.363 ” | |
| | **3.660.619 mia.** | **3.660.619 mia.** |

**2003**

| | | |
|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur** | 3.238.067 mia. | |
| **Løguútreiðslur** | 260.000 mió. | |
| **Rentuútreiðslur, netto** | 69.954 ” | |
| **Afturgjald av skuld** | 447.906 ” | |
| **Skattur og avgjøld** | | 3.088.000 mia. |
| **Ríkisstuðul** | | 629.739 mió. |
| **Gjaldførishall** | | 298.188 ” |
| | **4.015.927 mia.** | **4.015.927 mia.** |

# Nú er vent í holuni

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Orðaskifti á lágum støði. Øðrvísi kann tað ikki sigast, tá umrøðan av fyrispurningi frá fyrrverandi mentanarlandsstýrismanni var á løgtingi seinasta fríggjadag.

Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, hevði sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, fyrispurning um valið av nevndarlimum í Framtaksgrunninum, og vit kunnu skjótt semjast um, at spurningurin er sera aktuellur.

Tað, sum best kom fram í viðgerðini, (og spell var tað) var tó orðalagið hjá fyrrverandi landsstýrismanninum í mentamálum, tí skal hatta verða støðið í framtíðar fullveldinum Føroyum, sum samgongan ætlar og ynskir sær, so er okkurt sum als ikki ruggar rætt!

Her ber heldur ikki til at geva dønum skuldina, sum Tjóðveldisflokkurin annars plagar, tá ongin annar er at skylda uppá. Men her er møguliga okkurt við at taka seg upp, so onkur fær eitt páskot til at taka seg burturúr samstarvinum.

Møguliga skulu fráboðaðar kannirngar frá OECD avleiða og sissa partarnar eina tíð, men um so var at slíkar komu í lag, so hevði lagnan helst blivið hin sama sum við øðrum kanningum, m.a. hjá donsku ráðgevandi nevndini á sinni.

"Hvør er í samgongu, og hvør er í andstøðu ?" helt onkur fyri, tá fundurin endaði, og tað var ikki so undarligt.

**Formaningarnar hjá Høgna**

So kann formaður Tjóðveldisfloksins tosa, skriva og formana, sum hann vil um "partapolitiska málning", sum skal burtur, ella "partapolitiskt tvassarí", sum oyðileggur alt. Sjálvandi meinar hann altíð við hinar, tá hann brúkar hesar vendingar.

Sjálvur gongur hann fremst í niðurgerð av annaðleiðis hugsandi, tá hann skrivar um "eitt valevni, sum upptraðkar sum búskaparfrøðingur", tá hann sipar til ein búskapar-frøðing, ið torir at standa við at hann er sambandsmaður, og sum eisini hevur dittað sær at vera kritiskur móti Høgna bæði nú eins og móti hansara útgreining av Hvítubók á sinni.

Gott er tað, at enn eru fólk, sum tora at siga sína meining, sjálvt um hon gongur móti tí hjá teim ráðandi í landinum, men máti skal vera við øllum. Eisini tá fyrrverandi umboð fyri fullveldismentanina rópa og geyla á tingsins røðarapalli móti sínum egnu samstarvsfeløgum, men tó halda fast við somu samgongu fyri at varðveita maktina, so ongin annar skal sleppa framat.

Men "partapolitiska málingin", sum Høgni nevnir, kann enn halda samgonguni saman, og til ber at klína meira og meira uppá eina tíð afturat.

Einaferð man hon tó fara at rivna antin eftir trýsti uttanífrá ella, sum nú kundi sæð út, innanífrá. So er spurningurin, hvør flokkur gevur seg fyrst.

Vónandi verður alt ov stórur skaði ikki hendur áðrenn tað. Men sokallaða glasiliga málið, fullveldið, bæði hjá hesi víðkaðu og hjá fyrru samgonguni, hevur fingið djúpar og alt meira sjónskar rivur seinastu tíðina, so her er sanniliga vent í holuni, tað má sigast.

# GjaldSkipanin lýkur øll krøv í verandi lóggávu

**TÍÐINDASKRIV**
*P/f Elektron*

Peningastovnarnir hava síðani í summar marknaðarført eina skipan til gjaldan við rokningum - kallað GjaldSkipanin - sum m.a. skal avloysa verandi V&T-skipan. GjaldSkipanin byggir á eitt samstarv ímillum P/F Elektron og PBS, sum føroysku peningastovnarnir er parteigarar í.

GjaldSkipanin betrar munandi um kunningina til, og trygdina hjá, gjaldaranum, sum rindar rokningar sjálvvirkandi. Fráboðan um komandi trekk av kontuni verða send gjaldaranum í góðari tíð, áðrenn goldið verður, soleiðis at stundir eru at frámelda gjaldið, um ein ikki er samdur í rokningini. Í næstum verður eisini møguligt at samskifta við GjaldSkipanina ígjøgnum homebankingskipanina.

Eisini uppkrevjandi virkini og stovnarnir fáa størri møguleikar í skipanini. M.a. er møguligt at senda faktura við øðrum útgreiningum út við fráboðanini frá GjaldSkipanini til gjaldaran, so at virkini sleppa frá at senda rokningar út. Elektron bjóðar sær eisini við nýggju skipanini til at standa fyri útsending av øllum rokningum hjá virkjum.

Talan er sostatt um eina gjaldsmiðlingsskipan sum er millum tær mest framkomnu í heiminum.

Tað er tí óheppið, at tað í fjølmiðlunum er sáddur ivi um GjaldSkipanin lýkur ásetingarnar í løgtings- lóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerð frá 17. desember 2001 um flyting av persónsupplýsingum til útlandið.

GjaldSkipanin lýkur sjálvsagt galdandi føroyska løgávu. Dátueftirlitið, sum umsitir kunngerð frá 17. desember 2001, hevur tann 13. juni 2002 givið P/F Elektron eitt treytaleyst loyvi til at samstarva við PBS um verksetan og rakstur av GjaldSkipanini.

Tað fyrikemur okkum óhugsandi, at ein møgulig seinni løggáva ella nýggj kunngerð á økinum vil forða fyri samstarvinum hjá P/F Elektron við PBS um GjaldSkipanina, á sama hátt sum tað er óhugsandi, at løggevararnir vilja leggja seg út í samstarvið hjá P/F Elektron við PBS um FR-kortið.

Tað er í rættarsamfeløgum ikki siðvenja at løggeva við afturvirkandi gildi, og tað skulu sera tungtvigandi orsøkir til, at myndugleikar kunnu taka eitt longu givið loyvi aftur.

# Amnesty skipar fyri internetkapping

**KAPPING**

Amnesty International er farið undir internetkapping fyri børn og ung. Talan er um einfalda spurnarkappping í fýra umførum, sigur Amnesty International Føroya Deild í tíðindaskrivi.

Talan er um internetkapping, og er hon tí sum vera man á heimasíðuni hjá Amnesty International Føroya Deild. Kappingin er serliga ætlað børnum og ungum, men sjálvandi eru øll vælkomin at luttaka, stendur í tíðindaskrivinum, sum sent er umd agarnar.

Kappingin er í fýra umførum, sigur Amnesty International Føroya Deild í tíðindaskrivinum. Talan er um spurnarkapping, har farast kann inn á heimasíðuna hjá felagnum og svara teimum spurningum, sum har standa.

Øll, sum svarað hava spurningunum, verða við í lutakasti um tveir vinningar í hvørjum umfarinum.

Tá øll spurnarumførini eru liðug, verður umframt kastað lut um tveir størri vinningar, stendur í tíðindaskrivinum.

Verða fleiri svar send inn við sama navnið, telur bara tað fyrsta, sum sent verður, við.

Vinningarnir, sum latnir verða, eru millum annað gávukort til bøkur og fløgur. Høvuðsvinningarnir eru ein ghettoblastari og eitt gávurkort.

Kappingin byrjaði leygardagin, og tey, sum hava hug at royna seg, kunnu seta seg við telduna og finna adressuna: www.amnesty.fo

**ej**

Hug at royna tína vitan?



# Nýggja gjaldskipanin stendur við

**– Tað fyrikemur okkum óhugsandi, at ein møgulig seinni lóggáva ella nýggja kunngerð á økinum vil forða fyri samstarvinum hjá Elektron við PBS um gjaldskipanina, skrivar Elektron í tíðindaskrivi**

**GJALDSKIPAN**
*Heri á Rògvi*



*Hjá Elektron halda tey fram sum er við teirri nýggju GjaldSkipan*

Rættiliga rok hevur nú tikið seg upp viðvíkjandi teirri nýggju gjaldskipanini, sum hevur hepna navnið GjaldSkipanin.

Landsins myndugleikar eru ikki heilt foreintir við, um hendan nýggja skipanin skal vera loyvd ella ei.

Skipanin er gjørd í samstarvi við PBS (Pengeinstituternes Betalings Service).

– Tað fyrikemur okkum óhugsandi, at ein møgulig seinni lóggáva ella nýggja kunngerð á økinum vil forða fyri samstarvinum hjá Elektron við PBS um GjaldSkipanina á sama hátt sum tað er óhugsandi, at lóggevararnir vilja leggja seg út í samstarvið hjá Elektron við PBS um FR-kortið, skrivar Elektron í tíðindaskrivi.

Niels Christian Nolsøe, stjóri fyri Elektron, ger greitt, at skipanin koyrir í løtuni, og hon fer í framtíðini at koyra.

– Vit hava gjørt eina sera góða skipan, sum bæði hevur kostað okkum nógv, og sum nógvir kundar eru farnir at nýta. Frá Dátueftirltiinum, sum er myndugleiki á økinum, hava vit eisini fingið neyðuga loyvið, so vit halda fram sum er, sigur Niels Christian Nolsøe.

Tað kom ótrúliga illa við hjá honum og Elektron, tá tey frættu um, at ein møgulig lógarbroyting var á veg á økinum.

– Tað er ikki siðvenja at broyta lóggávu við afturvirkandi kraft, og tað rokna vit heldur ikki við í hesum førinum, sigur Niels Christian Nolsøe.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Høgna Hoydal til eina viðmerking. Varaløgmaður er staddur uttanlands.








Sosialurin
www.sosialurin.fo



UNIVERSITY of ABERDEEN

VETRARSKEIÐ

LÆR ENSKT Í SKOTLANDI

Intensivt skeið á University of Aberdeen
1, 2 ella 3 vikur

**SKEID 1:**
**21. Oktober – 13. Desember**
Byrjanarskeið: Tey, sum duga enskt á byrjunarstøði.

**SKEID 2:**
**13. Januar – 21. Mars**
Miðal: Tey, sum hava nakað av kunnleika til enskt frammanundan.

**SKEID 3:**
**7. Apríl – 20. Juni**
Yvir miðal: Tey, sum hava kunnleika í enskum, men vanta royndir til víðari lestur.

**KOSTNADUR FYRI HVØNN:**

| 1 vika | 2 vikur | 3 vikur |
|---|---|---|
| 7.949,- | 12.549,- | 17.749,- |

**Íroknað prísin er:**
Flogferð Føroyar – Aberdeen og aftur við ferðaavgjøldum. Undirvísing í minst 20 tímar um vikuna + kjak tímar. Undirvísingartilfar. Innivist á einakamari á skúlaheiminum Kings Hall.

Ferðatrygging er ikki íroknað.

Ivast tú í, hvørjum støði tú ert á, so kanst tú tosa við ein lærara á University of Aberdeen, sum hjálpir við at finna rætta skeiðið.

Um gist verður á hotelli ístaðin fyri á skúlaheiminum, kostar tað 900 krónur eyka um vikuna.

Ring og fá meiri at vita um skeiðini á tel. 34 10 40, Atlantic Airways.

Les meira á heimasíðuni hjá University of Aberdeen www.abdn.ac.uk

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo